# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Signar á Brúnni 60

Hósdagin 10. februar fylti Signar á Brúnni í Fuglafirði 60 ár. Hann er vælkendur um landið sum løgtingsmaður og landsstýrismaður í tilsamans 28 ár.

Signar er sonur Siggu og Jógvan Hansen í Fuglafirði. Hann hevur verið móðurloysingur frá fyrsta degi, tí mamman doyði í barsilssong við honum. Hann vaks tí upp hjá pápabeiggjanum, skiparanum Hans David Hansen, og konu hansara Kristiannu. Og væl man hann hava trivist, tí hann hevur roknað og kallað tey foreldur, og systkinabørnini Atla og Katrinu hevur hann kallað systkin.

Signar er útbúgvin lærari og var fyrst lærari á Strondum í fýra ár. Síðani hevur hann havt fast starv í Fuglafjarðar Skúla. Boð hava tó verið eftir honum at vera skúlaleiðari í styttri skeið á Eiði, í Lorvík og í Vestmanna. Tað sigur eitt sindur um tað álit, sum skúlamyndugleikarnir hava á honum, at hann hevur verið boðsendur, tá á stóð.

Eisini er hann ítróttamaður og spældi við á 1. liði hjá ÍF í mong ár. Hann var góður spælari.

Vit báðir Signar komu at kennast, tá hann 25 ára gamal varð valdur inn á ting í 1970 fyri Tjóðveldisflokkin í Eysturoynni. Hann var tingmaður til 2002, tá hann ikki stillaði uppaftur, tó árini 1980-84 undantikin. Hann læt varamann



møta fyri seg á tingi tey trý umførini, hann var landsstýrismaður í 1989-90, 1993-94 og 1998-2000. Av øðrum álitisstørvum kann nevnast, at hann var limur í Landsskúlaráðnum í 12 ár og í Mentanargrunninum í 16 ár.

Signar hevur víðan sjónarring og hevði tí eisini sum politikari áhuga fyri øllum samfelagsmálum, men serligan áhuga hevði hann fyri skúla- og mentanarmálum. Hesi mál umsat hann í fleiri umførum sum landsstýrismaður. Tey torføru árini 1993-94 hevði hann eisini kommunumál um hendi, og tað var ikki tað léttasta at umsita tá. Tað var hansara hugskot at stovna ein kommunalan láns- og veðhaldsgrunn, eins og hann eisini setti bæði hámark og lágmark fyri kommunalu skattaprosentunum.

Hann gloymdi heldur ikki tað valdømið, hann umboðaði, Eysturoynna. Altíð fúsur at styðja, tá tann oyggin skuldi hava okkurt. Og útbyggingin av studenta- og handilsskúla á Kambsdali var eitt av hansara hjartamálum.

Signar er ikki givin heilt sum politikari, hóast hann ikki situr á tingi longur. Á seinasta kommunuvali varð hann valdur inn í býráðið í Fuglafirði, og har er hann við í einari breiðari samgongu.

Signar er álitismaður og góður vinur. Politiskt hevði hann eitt tev sum fáur og dugdi í allari stillheit at fáa sítt ígjøgnum. Hann veipaði ikki nógv við ørmunum, og harðmæltur var hann heldur ikki, men at fáa úrslit, tað dugdi hann.

Signar er giftur við Gunnvør av Skipanesi, dóttir, Marin og Andreas Skipanes. Gunnvør og Signar búgva í Fuglafirði og eiga børnini Hans David, Marin og Jógvan Andreas og ommu- og abbabørnini Jákup, Barbu Signar.

Hjartaliga tillukku, Signar, ynskja Ása og eg!

**Finnbogi Ísakson**

## Niels Olgar Joensen 50 ár

Sunnudagin 13. februar 2005 fyllir Niels Olgar Joensen í Sandavági 50 ár.

Niels Olgar er føddur og uppvaksin í Sandavági. Foreldrini, Hjørdis, f. Heinesen, og Finn Joensen, eru bæði úr Sandavági.

Eftir loknan barna- og realskúla fór Niels Olgar til Havnar, og tók hann studentsprógv í Hoydølum.

Ætlanin hjá honum var at lesa til verkfrøðing, men hann fór heldur at hjálpa pápanum í fyritøkuni við hýrivognum, lastbilum og bussum.

Seinni yvirtók Niels Olgar sjálvur fyritøkuna, sum eisini rekur Ferðamannheimið á Giljanesi.

Hann hevur verið virkin í fráhaldsrørsluni á Føroyum og var við til at stovna UTF (Ungtemplarasamband Føroya) og sat í nevndini har í mong ár.

Hann er eisini limur í Javnaðarflokkinum og hevur verið stillari hjá flokkinum í Vágum.

Niels Olgar syngur í



Vágakórinum og Sandavágs Sangkóri.

Hann er ein sera arbeiðssamur maður, sum hevur tað best, tá hann hevur nokk at takast við.

Niels Olgar er giftur við Sólvá, f. Jacobsen, úr Sandavági. Tey eiga trý børn, Heidi 20 ár, Brian 17 ár, og Fríðfinnur 5 ár.

Føðinardagurin verður hildin í heiminum í Sandavági leygardagin 12. februar. Opið hús verður frá kl. 18, og kl. 22 verður grannaveitsla.

# Føroya fyrsti biografur

Millum føringar tykist áhugin fyri tí søguliga, fyri tilburðum og viðurskiftum í farnum tíðum, at vera stórur. Um enn tað ikki røkkur so langt aftur í tíðina, er forvitnisligt eitt nú at lesa tað, sum Birgar Johannesen eftir nágreiniligar granskingar í bløðunum frá seinastu øld hevur funnið fram til og nú leggur fram í ljósið aftur í Sosialinum undir heitinum "Havnar leksikon".

Undir hesum teigi í bløðnum nakað herfyri greiðir Birgar frá um gamla biografin hjá Dia Bø í Tórsgøtu, Føroya fyrsta biograf, sum hann nevnir hann, og sum vit eldru hava so livandi minnir um. Men lesandi henda stubba datt mær í huga, at kanska átti eg at skoytt nakað uppí um hesi viðuskifti, sum mamma fortaldi okkum frá sínum barnaárum í Vestmanna.

Í heiminum uppi á Heygum eins og á handilsvirkinum niðri á Heyganesi streymaði fólk til og frá í vælmaktsdøgunum hjá abba okkara Ólavi á Heygum. Ólavur var maður við fjølbroyttum og impulsiv-



*Ólavur á Heygum (1866–1923)*

um lyndi. Einaferð var norðmaður komin framvið at vísa fólki ljósbíløt. Um hann kom av sínum eintingum, ella um abbi, sum í sambandi við sínar hugsjónir og ætlanir um el-útbygging í Føroyum hevði nógv samband við Noreg, hevði elvt honum til at koma, veit eg ikki. Men hetta á einum lørifti at kunna síggja myndir og hendingar uttan úr heimi hugtók fólk so nógv, at abbi gjørdi stutt av og keypti tólini frá norðmanninum. Eftir hetta kundu nú vestmenningar meira og minni regluliga fara í biograf, um tað so hevur verið í skúlanum, í onkrum pakkhúsrúmi á Heyganesi ella kanska í stovuni "har Frammi", har sum bygdafólkið kundi samlast til ymisk serhøvi.

Johannes Didriksen, vanliga kallaður Hvítanes-Jóannes, var tiltikin hegnismaður, fyrst og fremst jarnsmiður, men eisini handverkaligur álitismaður í bygdini í so mongum øðrum førum. Hann fekk nú eisini tað upp í hendur at passa myndatólið. Mamma greiddi frá, hvussu hugnaligt og stuttligt tað var hjá teimum børnum at savnast til hesar myndasýningar, og ikki minst var tað skemtiligt, tá ið brendi saman og slitnaði, og Hvítanes-Jóannes mátti brúka allar snildir at fáa tað at mala aftur.

Tá ið hóttafall kom á virksemið hjá abba - ikki minst av øvund og persónligum ágangi og forfylging vegna hansara tjóðskaparligu hugsjónir -, fall so mangt niðurfyri har í umhvørvinum, eitt nú hetta at ljósmyndasýningarnar hildu uppat. Abbi hevði nógv samband við vin-



*Handilsvirkið hjá Ólavi á Heygum í Vestmanna*

mannin Jóannes bónda í Kirkjubø. Kanska var tað tann vegin, at Dia úti á Bø var komin í arbeiði hjá honum. Veit onki meira um hesar umstøður; men mær er nú sagt, at Dia, sum mín heimildarmaður meinti at hava verið á landbúnaðarskúla, var m.a. óførur at handfara ross til pløgingar, sum ikki var vanligt tá. Bragdligur maður skuldi hann vera, og hann gjørdist tá eisini fyristøðumaður í arbeiðinum at fáa lagt telefonsamband út um landið - abbi fekk jú fyri egna rokning lagt fyrstu telefonlinjuna í Føroyum úr Vestmanna til Havnar og hevði tey fyrstu árini hesa koncessión um hendur. Eftir hesa samvinnu við Ólav bónda fekk Dia so eisini tað burturúr, at hann kundi flyta kykmyndatólini við sær úr Vestmanna til Havnar og byrja sýningar í Tórsgøtu.

Áhugavert er at skoyta uppí, at tá biografurin "Dia Bø" í Tórsgøtu varð niðurlagdur, og Sjónleikarhúsið fekk hetta biografloyvi í 1947, komu gomlu myndatólini aftur til Vestmannar. Tað var Ásmundur á Rógvu, sum tá fór undir myndasýningar í Dansistovuni har í bygdini. Og hevur onkur hug at hóma aftur á henda tátt í Vestmanna søgu, so eru tólini í dag til skjals á Vestmanna Bygdarsavni.

Mangt og hvat kundi verið at fest á blað um merkismannin Ólav á Heygum í Vestmanna. Høvi var fram til fyri 10-15 árum síðan at komið á tal við fólk, sum høvdu kent Ólav bónda. Hetta høvið varð tíverri ikki nóg væl nýtt - kanska eisini tí, at hansara lagna var ein so sár søga at nema við. Men *um onkur, lesandi hesar reglur, skuldi komið í huga um okkurt áhugavert um mannin - tað kann vera bæði til tað positiva og tað negativa, tí hann var ein kontroversiellur persónur - ella kanska hevur okkurt aktuelt skjal liggjandi - abbi hevði m.a. handilssamband við so nógvar bygdir -, so hevði eg verið takksamur at frætt um tað. Mín telduáskrift er* *olavasa@post.olivant.fo* *telefonnummarið er 31 18 19 og bústaðurin Heiðavegur 18 í Havn.*

**Ólavur Hátún**